## Suðuroy, Tórshavn, Klaksvík

# Vísindavøka 2009

sansir.fo

Nú er eitt høvi hjá øllum at hoyra granskarar greiða frá um teirra úrslit og teirra dagliga arbeiði í granskingarumhvørvinum.

Í ár verður Vísindavøkan hildin í Suðuroy, í Tórshavn og í Klaksvík.

3 granskarar luttaka á hvørjum staði við framløgu um teirra granskingarvirksemi.

Vísindavøkan er partur av tiltakinum European Researchers' Night.

Endamálið er at skapa øktan kunnleika um og áhuga fyri tí, sum fer fram innan føroyska granskingarheimin.

**Mikukvøldið 23. september klokkan 19.30 í Miðnámsskúlanum í Hovi:**

**Dennis Holm**, *samfelagsfrøðingur og granskari:*
- Hví samfelagsgransking? Framløga um, hvat samfelagsgransking er, hví samfelagsgransking hevur týdning, og hvørjum evnum granskað verður í á Granskingardeplinum fyri samfelags-menning.

**Maria Skaalum Petersen**, *Ph.D. og granskari:*
- Parkinsons sjúka og umhvørvið

**Ása Róin**, *útbúgvingarleiðari á Sjúkrarøktar-frøðisskúla Føroya:*
- Urinkontinens hjá kvinnum millum 60 og 65 ár í Føroyum. Títtleiki og ávirkan á gerandis-lívið.

**Hóskvøldið 24. september klokkan 19.30 á Náttúrugripasavninum:**

**Hjálmar Hátun**, *havfrøðingur og Ph.D.:*
- Gróður á opnum havi

**Tóra Petersen**, *cand.psyk. og Ph.D. lesandi:*
- Sálarligir løstir hjá børnum og ungum

**Anna Maria Fossá**, *plantufrøðingur og Ph.D.:*
- Plantuvøkstur í einum umhvørvi í broyting.

**Fríggjakvøldið 25. september klokkan 19.30 á Norðoya Fornminnissavni:**

**Pál Weihe**, *yvirlækni:*
- Umhvørviseitur og heilsan hjá børnum í Føroyum

**Katrin Næs**, *cand.phil, Ph.D. lesandi:*
- S fyri k - okkurt um, hvussu børn læra at skriva

**Karin M. H. Larsen**, *havfrøðingur, Ph.D.:*
- Góð og ring ár á landgrunninum – týdningurin hjá umhvørvinum.

**Granskingarráðið hevur tvey høvuðsarbeiðsøki:**
- at ráðgeva landsstýri og vinnu í granskingarpolitiskum spurningum.
- at umsita Granskingargrunnin, sum veitir fígging til gransking, menning og nýskapan.

granskingarráðið THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 56 78 00 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo

BYGMA BALSLEV

## BYGMA BALSLEV SØKIR...

### leiðara til Byggibúðina.




Byggibúðin hjá Bygma Balslev, ið er tann elsta í landinum, er nýliga ístandsett og dagførd, so tað er ein nýmótans handil, ið tú kemur at verða leiðari fyri.

Tú fært ábyrgdina av dagliga rakstrinum av Byggibúðini, og ein munandi partur av arbeiðinum verður at motivera starvsfólki, og geva íblástur soleiðis at Bygma Balslev heldur fast um leiðandi leiklutin á marknaðinum. Harumframt fært tú eisini ábyrgdina fyri marknaðar-føringini av Bygma Balslev.

Tú mást vænta ymsar arbeiðstíðir og nakrar langar dagar av og á, og vit vænta at tú, við ágrýtni og góðum keyp-mansskapi, tryggjar framhaldandi framgongd.

Best er um tú hevur hóskandi leiðsluroyndir/útbúgving, og er stinn/ur í teldunýtslu.

Bygma Balslev kann bjóða tær eitt gott, trygt starv, við góðum arbeiðsfeløgum, og góðum umstøðum annars. Lønin verður ásett eftir avtalu.

Ljóðar hetta áhugavert, so er at senda umsókn sum skjótast, og viðhefta avrit av møguligum prógvum og viðmælum.

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinastalagi 28. september.

Nærri upplýsingar fáast við at tosa við Bent á Lava - bent@balslev.fo

Bygma Balslev • Vegurin Langi • 188 Hoyvík • tlf. 345000 • www.balslev.fo

# INPACT søkir grannskoðara

## Søkt verður eftir grannskoðara at byrja skjótast til ber.

**Starvslýsing**
Fyri rætta viðkomandi er talan um eitt áhuga-vert og avbjóðandi starv. Arbeiðið fevnir um grannskoðan, roknskaparhjálp og eina røð av øðrum tænastum til føroyskar og útlendskar fyritøkur – stórar sum smáar – innan flest allar vinnugreinar, eins og til kommunur og almannar stovnar v.m

**Umsøkjarin**
Persónurin, sum vit leita eftir, skal hava royndir og/ella ástøðiliga útbúgving innan grannskoðan.

**Vit leggja dent á, at tú hevur persónligar eginleikar sum:**
- evni og menna teg við uppgávunum
- vilja og evni til at arbeiða sjálvstøðugt
- søkir ábyrgd og ávirkan heldur enn sleppa tær undan

***Útbúgving og framtíðarmøguleikar***
Um hugurin er til tess, kanst tú halda fram og taka ta útbúgvingina, sum skal til fyri at kunna gerast statsautoriseraður/løggildur grannskoðari. Eisini verður talan um innan-hýsis útbúgving.
Umhugsar tú at søkja og vilt hava meiri at vita, ella ivast tú bara í onkrum, kanst tú ring-ja til okkum og spyrja eftir Jógvan Amonsson statsaut. revisor ella Fróða Sivertsen, statsaut. revisor.

Um hetta er nakað fyri teg, kanst tú senda okkum eina umsókn við CV áðrenn 28. sep-tember 2009.

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT
løggilt Grannskoðaravirki
R.C. Effersøesgøta 26
Postbox 191
FO-100 Tórshavn

Teldupostur: inpact@inpact.fo

Sp/f Grannskoðaravirkið
INPACT

Limur í RevisorGruppen Danmark:
Fakligt samstarv millum óheft grannskoðaravirki í Danmark, Føroyum og Grønlandi.

Limur í INPACT AUDIT Ltd.
An international Network of Accounting and Auditing Professionals.

Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT · løggilt grannskoðaravirki · R.C. Effersøesgøta 26 · Tórshavn
Tel 314700 · Fax 313815 · inpact@inpact.fo · www.inpact.fo